# Fundarfrágreiðing

Ár 2016, tann 07. apríl, varð ársaðalfundur hildin í P/f Vágatunnilin. Fundurin varð hildin á Hotel Hafnia og byrjaði kl. 11.00.

Fundarluttakarar:

Partaeigarin var umboðaður av Kaj Johannesen, fulltrúa í Samferðslumálaráðnum, sum nú hevði umsitingina av samferðslukervinum um hendi, herundir undirsjóvartunlum. Kaj upplýsti, at hann í dagliga yrki sínum fekst við hesa umsiting og hevði starvsfulltrú at møta vegna partaeigaran. Øll nevndin var á fundi, og eisini stjórin Uni Danielsen, umframt Reinhold Isaksen. Óla Jákup Kristoffersen, adv. var eisini á fundi.

1. Nevndarformaðurin Jens Kári Vilhelm ynskti vælkomin og skeyt upp at velja Óla Jákup Kristoffersen, adv. sum fundarstjóra. Hann varð valdur. Fundarstjórin staðfesti, at fundurin lógliga var innkallaður, og lýsti soleiðis fundin sum lógliga settan.

2. Stjórin Uni Danielsen greiddi vegna nevndina frá virki felagsins í farna ári, herundir eisini kunning sambært § 18. Hann greiddi millum annað frá um fíggingina av tunlinum, at ultimo 2015 var lánsskuldin umleið kr. 200.000,00 einamest fyri at varðveita verandi lán- og veðskjøl. Hann greiddi eisini frá um sambinding av íbúgvum í Føroyum. Greiddi frá miðalferðslu pr. dag í 2015 ella 1.865 akfør, sum var 681.000 bilar tilsamans í 2015. Prísir vóru lækkaðir gjøgnum árini, og ymisk hagtøl og grafar vórðu vístir. Greitt var frá rakstraræltan fyri 2016, herundir umsetningi 12,9 mió. kr., úrslitið hall 1,7 mió. kr. og likviditetsavlop 5,8 mió. kr.

Jens Kári suppleraði við at siga, at ultimo 2016 var likviditetur felagsins væntandi umleið kr. 20 mió. kr. við núverandi prísum.

Spurningar og viðmerkingar vórðu gjørdar undir frágreiðingini, og síðani varð frágreiðingin tikin til eftirtektar.

3. Stjórin Uni Danielsen gjøgnumgekk roknskapin.

Aftaná gjøgnumgongdina spurdi Kaj, hvat scrap-virðið á vegum og tunlum var. Stjórin og formaðurin svaraðu, at hetta svaraði til, tá avskrivað varð niður til partapeningin.

Roknskapurin varð síðani góðkendur.

4. Ársavlop varð flutt til næsta ár.

5. Nevndin varð afturvald.

6. Val av grannskoðara.

Formaðurin Jens Kári Vilhelm vísti til aðalfundin í fjør, tá landsstýrismaðurin ynskti, at grannskoðarauppgávan varð boðin út. Felagið hevði tí bjóðað grannskoðarauppgávuna út til 4 virkir, grundað á nakrar ávísar útboðstreytir. Bíligast var NUMO, løggilt grannskoðanarvirki Sp/f við einum boði kr. 24.000,00 fyri eitt ár. NUMO hevði í sínum boði ásett nakrar fortreytir. Eftir samskifti millum NUMO og felagið, hevði NUMO strikað allar fortreytir, so at innkomin boð vóru samanlíknilig.

Nevndin mælti til at taka av bíligasta boðnum, og tað tók partaeigarin undir við. Numo, løggilt grannskoðanarvirki varð tí valt til nýggjan grannskoðara ístaðin fyri P/f Januar, løggilt grannskoðanarvirki.

7. Innkomin uppskot og ymiskt.

Jens Kári Vilhelm las upp skriv frá samferðsluráðnum, sum nú umsat tunnilin og sum var dagfest 01. apríl 2016 og stílað til P/f Vágatunnilin. Av skrivinum framgekk, at undanfarni landsstýrismaður heitti á felagið um at avhenda tunnilin til landið í 2016, sum varð viðtikið á aðalfundi í P/f Vágatunlinum 14. apríl 2015, at felagið skuldi lata landinum tunnilin 10. desember í ár. Spurningurin hevði verið umrøddur á fundi 8. mars 2016 millum núverandi landsstýrismann og P/f Vágatunnilin, har Rúni Joensen, aðalstjóri, Jens Kári Vilhelm, nevndarformaður, og Uni Danielsen, stjóri, luttóku, umframt Henrik Old, landsstýrismaður. Á fundinum varð lógargrundarlagið umrøtt, og sambært lógini er tunnilin ikki afturgoldin, fyrrenn øll íløgan ella útveganarkostnaðurin er afturgoldin. Vísandi til omanfyri nevnda, skal Samferðsluráðið tí vegna landsstýrismannin boða frá, at Vágatunnilin ikki skal latast landinum í ár. Tað skal gerast, tá útveganarkostnaðurin sambært lógini er fult afturgoldin.

Viðvíkjandi príspolitikki verður vent aftur til seinni.

Nevndin tók hesi boð frá partaeigaranum til eftirtektar.

Til endans takkaði formaðurin Jens Kári Vilhelm fyri tað álit, sum var víst nevndini við at afturvelja nevndina.

Fundurin lokin.

Sum fundarstjóri:

Óla Jákup Kristoffersen, adv.